# Sýningarnar lata upp aftur

*Eftir at hús og framsýningar eru umvæld, hevur Náttúrugripasavnið aftur latið hurðarnar upp við stásiligum sýningum og nýggjum og áhugaverdum savnstilfari*

DAGFINN OLSEN

Eftir at hava umvælt hús og framsýningar, er aftur veruliga komið skikkur á aftur á Náttúrugripasavninum.

Nú eru hurðarnar aftur opnar fyri vitjandi og eftir at bert sýningar á leysum veggum hava verið, eru nú aftur veggfastar sýnngar.

**Grias**

Fuglar, plantur og fiskar.

Og eisini løgnir fiskar.

Í 1997 kom undan kavi á Føroya Banka leiðini ein undarligur fiskur, ið fekk kelinavnið Grias. Ein sjáldsamur fiskur, sum ikki er í mongum eintøkum omanfyri vatnskorpuna kring knøttin.

Eisini eru onnur nýggj og forvitnislig savnsfyribrigdi at uppliva og hyggja at hjá vitjandi.

Ikki allir eru vakrir. T.d. er stóra Laksastyrjan at síggja. Hon sigst smakka væl betri, enn hon sær út og er til tíðir at fáa á gistingarhúsum í Føroyum.

Tað er Kristian Meitil, ið hevur gjørt framúr avstoypingarnar úr plasti av havsins íbúgvum. Hann var konservator, til hann fór frá fyri kortum.

**Grindir**

Hvalir og beinagrindir av hvalum eru komnar upp at hanga og tann risastóri skølturin av einum Augusti er eisini at síggja. Henda hava tey á Náttúrugripasavninum sjálvi fingið á savnið, eftir at Augusturin rak á land í Rituvík. Hetta er ein hannur, tí tað eru bert teir, ið eru á leiðini kring Føroyar.

Náttúrugripasavnið hevur um dagarnar eisini givið út plakatir og kalendara við fuglamyndum fyri 2001 og bókina Flora. Eisini ber til at vitja á heimasíðuni www.ngs.fo, har eisini listi er yvir plantur býttar upp eftir økijum, har tær vaksa í Føroyum. Eisini er ein nýggj planta, sum varð funnin í fjør, at síggja.

Uttanfyri savnið er eisini ein føroyskur botaniskur havi at síggja.

**Greiða frá**

Opið er gerandisdagar frá klokkan 11 til 16 á Náttúrugripasavninum. Tað kostar 20 krónur at koma innar, men skúlanæmingar sleppa ókeypis.

Tað eru lívfrøðislesandi á Fróðskaparsetrinum, ið greiða frá og vísa teim vitjandi runt á Náttúrugripasavninum.



*Eftir at hava umvælt hús og framsýningar, er aftur veruliga komið skikkur á aftur stásiligu framsýningarnar á Náttúrugripasavninum*



*Grias kom av Føroya Banka í 1997. Hann er sjáldsamur og kring knøttin eru ikki mong eintøk omanfyri vatnskorpuna*



*Dorete Bloch, savnsstjóri, vísir Laksastyrju, ið ikki er vakur fiskur, men sum sigst smakka væl betur, enn ein kann ímynda sær. Fæst til tíðir á gistingarhúsum*

***Myndir: Jens Kristian Vang***

## Ikki fyrstu ferð

RÆTTING: Í vikuni skrivaðu vit greinastubba um Andras Olsen, ið er komin við í úrmælingabólkin Orkester Norden. Upplýst varð, at hetta var fyrstu ferð, at føroyingur er við. Andras hevur gjørt vart við, at so er ikki. Sjálvur var hann við í 1993, í 1999 og so aftur í ár. Mikal Blak var við í bólkinum í 1994 og 1995.

Andras leikar trombon og brátt skal hann til Svøríkis, har venjingarnar til konsertirnar í summar byrja. *- blðm -*



## Listahátíð Føroya

*Norðurlandahúsið hevur ætlanir um broytingar í festivalpolitikkinum og at stovna Listahátíð føroya*

Einar 10 til 14 dagar í august ætlar Norðurlandahúsið at hava Listahátíð Føroya. Fyrireikingar eru gjørdar at seta á stovn Listahátíð Føroya – viðtøkurnar fyri Listahátíð Reykjavíkar umsettar – og fundir hava verið við umboð fyri Jazzfestivalin, Summartónar og Fólkatónleikarastevnuna, LISA, Tórshavnar Býrað og Undirvísingar- og Mentamálastýrið. Tað vísir seg, at hugskotið fær góða undirtøku.

Stovnandi aðalfundur hevur verið og umboðsráð skal veljast.

Í viðtøkunum stendur m.a., at Listahátíð Føroya er stovnur, ið fyrireikar og skipar fyri listastevnu í Tórshavn og aðrastaðni í Føroyum… Miðað verður eftir at halda stevnu hvørt ár. *- do -*



# Føroyar mugu hava eina reella skiftistíð

*- Skal ein skiftistíð verða politisk verulig, so skal reint peningaliga innihaldið í henni vera, at føroyski búskapurin ikki skal ígjøgnum eina kreppulíknandi støðu ella vera fyri hóttafalli*

JAN MÜLLER



Høgni Hoydal, landsstýrismaður heldur ikki, at nøkur kúvending er hend frá lands-stýrisins síðu, nú eftir at Anfinn Kallsberg, løgmaður hevur úttalað seg til fjølmiðlarnar um, at halda danir fast við eina skiftistíð uppá 4 ár, so verður eingin fólkaatkvøða.

- Landsstýrið hevur nú í tvey ár fyrireikað seg til samráðingarnar við danir og gjørt er eitt ítøkiligt sáttmálauppskot. Tveir fundir hava verið um tað. Tann fyrsti fundurin gekk við at fáa danir at góðkenna hetta uppskot sum samráðingarupplegg. Tað noktaðu danir fyri á fyrsta fundinum, men semja varð loksins kortini um, at hetta skuldi vera grundarlagið undir samráðingunum. Á tí næsta fundinum fingu vit politiskar ábendingar um, at øll tingini fóru at koma uppá pláss uttan tann búskaparliga partin, sigur landsstýrismaðurin, sum heldur tað vera heilt týðuligt, at tað er tann búskaparliga skrúvan, sum skal spennast um tumlarnar á landsstýrinum í hesum føri. Og tað er hetta, sum løgmaður reagerar uppá.

-Vit hava bygt okkara fyrireikingararbeiði uppá tær avtalur, sum vit hava gjørt við donsku stjórnina. Tað var jú ein greið avtala, at vit skuldu gera útgreiningararbeiðið, og vit skuldu koma við útspælinum. Tað stendur eisini í avtaluni frá 10. juni 98 í grein 9, at vit samráðast um føroyskt fullveldi og harundir eina búskaparliga skiftisskipan, sum skal miðja móti at byggja upp ein sjálvberandi føroyskan búskap. Tað er ein klokkuklár avtala, sigur Høgni Hoydal, sum vísir á, at fundurin 15. juni snýr um at fáa realitetssamráðingar um føroyska búskapin og framtíðarútlitini fyri honum. Tvs. hvat skal til fyri at byggja upp ein sjálvberandi føroyskan búskap.

-Og tað er klárt, at vit tá tosa um ein búskap, sum ikki verður fyri hóttafalli tvs. hvat man politiskt heldur er rímuligt fyri eini skiftistíð. Fær man ikki gongd á henda partin, er talan um avtalubrot frá danskari síðu heldur Høgni Hoydal.

**Realistiskan sáttmála**

Hann sigur seg annars ikki skilja fjølmiðlarnar í Føroyum og Danmark, tá teir leggja nakað nýtt í orðini, sum løgmaður hevur sagt um skiftistíð og fólkaatkvøðu.

-Tað er sólarklárt. Tað hevur løgmaður sagt, og tað er landsstýrið samt um, at vit skulu hava ein sáttmála, sum er realistiskur, soleiðis at fólk fáa ein reellan valmøguleika. Um danir ikki vilja samráðast um tað búskaparliga, ikki vilja tosa búskaparliga fornuft, men bara vilja brúka tað til hóttan, so er greitt, at løgmaður sigur, at tað ber ikki til. Tí tá verður tað hazardspæl. So útmeldingarnar frá løgmanni eru gjørdar í mun til ta samráðingarstøðu, sum man stendur í beint nú.

*-Men fasthalda danir, at tað verða fýra ár og hvørki meira ella minni, hvar standa vit so?*

-Landsstýrið hevur sjálvandi fyrireikað seg uppá allar møguleikar, men landsstýrið má í eini samráðingarstøðu - og fer tað sjálvandi - at halda seg til tær avtalur, sum eru gjørdar. Allar aðrar gitingar og hypotetiskir spurningar er ein heilt onnur støða, sum man ikki kann fara at rokna uppá, uttan at alt endar í fullkomnari naggatódn. Fer tú at spyrja um, hvat støðan er, um danir vilja loysa ella kvetta á stokkinum, so hevur tú eina heilt aðra støðu.

Høgni Hoydal heldur ikki tað er nøkur orsøk til at fara út í „finurligar" metingar. Man fer til samráðingar um tað, sum man hevur fingið avtalu um at røkka. Hann heldur, at spurningarnir eiga at verða settir til donsku stjórnina um, hvat hon vil røkka við ikki at fara inn í eina realitetsviðgerð.

-Vit hava sagt, at vit eru til reiðar at samráðast um eina skiftistíð, sum er rímulig, og so má samráðast út frá tí. Skal ein skiftistíð verða politisk verulig, so skal reint peningaliga innihaldið í henni vera, at føroyski búskapurin ikki skal ígjøgnum eina kreppulíknandi støðu ella vera fyri hóttafalli. Tað má vera ein skiftistíð, sum bygnaðarliga gevur føroyska samfelagnum møguleika at tillaga seg til at gerast sjálvstøðugt sigur landsstýrismaðurin og vísir til, at tað er ein gongd, sum kemur at ávirka okkara vinnulív, okkara fíggjarstovnar, okkara einstøku borgarar osfr. Og leggur hann aftrat, at tað er heldur eingin loynidómur, at hon eisini hevur eina sálarliga dimensión, sum eisini er ómetaliga týdningarmikil í búskaparligum samanhangi. Tað vita frá kreppuni í Føroyum sigur hann og heldur fram:

-Eitt var tað, sum kreppan hevði við sær í peningaligum trupulleikum. Men tann sálarliga avleiðingin av tí er eisini, at áræði, motivatión og tað at trúgva uppá, at tað fer at eydnast, skal vera við eisini. Tí er tað einasta rætta at siga, at sjálvsagt skulu Føroyar hava eina reella skiftistíð. Og hvat skal Danmark fáa burtur úr við ikki at ganga við til tað spyr Høgni Hoydal!

**Ikki víst samstarvshuga**

Hann vísir annars á, at danska stjórnin hevur ikki verið serliga samstavshugað í sambandi við tíðarsetingina av samráðingunum, men tað hevur so verið nakað, sum man hevur verið noyddur at liva við.

Nú minni enn eina viku undan samráðingunum vísir Høgni Hoydal á, at tað er fullkomiliga sólarklárt, at danska stjórnin - tað hevur hon sagt - ynskir ikki, at Føroyar gerast sjálvstøðugar. Tí hevur tað eisini í samráðingunum verið roynt at forða fyri, at man kemur víðari við ætlanunum hjá landsstýrinum. Tí er samráðingarstøðan hjá landsstýrinum eisini truplari enn tann hjá donsku stjórnini.

-Í Føroyum hava vit ikki andstøðuflokkar, sum siga, at vit eiga at lata landsstýrið samráðast. Vit hava harafturímóti andstøðuflokkar, sum siga, at tað sum landsstýrið ger, er beinleiðis skeivt, og tað siga teir eisini við danskar politikarar og fjølmiðlar. Tað er tað, sum danska stjórnin kann brúka í síni samráðing: tá man fer til harðar samráðingar og har báðir partar hava sínar meiningar og ynski, so er samráðingarstøðan hjá donsku stjórnini sterk, tí hon hevur undirtøku frá flestu flokkum á fólkatingi - hinumegin er samráðingarstøðan hjá landsstýrinum veik, tí her heima er tað ein stórur partur av tí parlamentariska grundarlagnum, sum beinleiðis mótarbeiðir landsstýrinum í samráðingunum.

Tað merkir sigur landsstýrismaðurin víðari, at vóru føroyingar samdir í heildini, at man sjálvandi skal hava eina rímuliga skiftistíð, og at hetta er eitt rímuligt krav frá føroyingum, tí man nú tekur tí fullu ábyrgdina - vit hava eisini verið undir donskum valdi í 600 ár, og tí má man hava eina rímuliga umstillingartíð - so hevði Nyrup ongantíð gjørt tað, sum hann ger í løtuni.

Høgni Hoydal ivast tí ikki í, at hevði Nyrup fingið nóg sterk krøv úr Føroyum og nóg sterka fokusering uppá, hvat føroyingar halda vera rímuligt, so hevði hann heldur ikki spælt út við 4-5 árum.

*-Sigur tú harvið, at tað er andstøðan, sum gevur donsku stjórnini trumfkort á hondina fyri at kunna ganga ímóti politikkinum hjá landsstýrinum?*

-Eg skal ikki pástanda, at hon ger tað tilvitað, men parlamentariska støðan í Føroyum ger, at Nyrup kann brúkar nakrar trumfir, sum hann annars ikki hevði kunnað brúkt. Tað ger, at hann kann koma við heilt ógrundaðum útmeldingum uttan at hann fær nóg sterkt svar uppá tiltalu.

Hví spyr eingin Nyrup um, hví hann heldur 4-5 ár eru rímulig. Hvat liggur í boðskapinum hjá honum? Eru 4-5 ára skiftistíð rímulig fyri eitt land, sum nú vil vera sjálvstøðugt, meðan eitt land, sum ikki vil vera sjálvstøðugt skal bara hava pengar í allar ævir? Tað hava vit ikki fingið nakra skilagóða grundgeving fyri enn heldur landsstýrismaðurin.

